## Hanus avloysir Magnus í Klaksvík

Hanus Simonsen, sum í løtuni avloysir sum prestur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi, fer 1. august til Klaksvíkar at vera prestur í fimm mánaðir. Trúboðin skrivar, at tað er Jógvan Fríðriksson, bispur, sum metir, at tørvurin er stórur í Klaksvík, og tí hevur hann sett Hanus Simonsen (myndin) at vera prest har árið út. Hanus hevur í umleið eitt ár verið avloysaraprestur fyri Berg Debes Joensen, sum er í farloyvi. Bergur kemur aftur í starvið 1. august, og tá fer Hanus til Klaksvíkar at vera prestur. – At seta Hanus sum prest í Klaksvík í fimm mánaðir, er eitt stig, sum eg og Stiftstjórnin hava tikið, og vit hava eisini tosað við kirkjuráðini á staðnum um hetta, og tey eru samd við okkum um hesa loysnina, sigur bispur. Magnus Brahé Jørgensen, prestur, er sjúkrameldaður í løtuni, og hin presturin í Klaksvík, Niels Pauli Danielsen, verður 70 ár seinni í árinum. Báðir prestarnir skulu eisini hava feriu í hesum tíðarskeiðinum.



## Dýrt í Føroyum

- Tað er blivið dýrari at liva í Føroyum, og prísirnir lækka ikki í bræði, sigur stjórin á Hagstovuni, Herman Oskarson sambært uf.fo. Serliga matur, klæðir og orka kosta meira, og sambært Hagstovuna er brúkaraprístalið hækkað seks prosent seinasta árið.



*Tey hava vant nøkur løg saman, og sluppu at framføra tey fyri almenninginum á seinasta skúladegnum*

# Seinasti skúladagur á Trøðni

**Hósdagin í farnu viku var seinastu skúladagur hjá nemingunum við skúlan á Trøðni**

SKÚLI

*Orð&myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Hetta er vanliga ein dagur, har nógv verður gjørt burtur úr og har næmingarnir sjálvir sleppa at vera í miðdeplinum eina góða løtu.

Hesin hósdagurin var einki undantak.

Í høllini varð borðreitt til ein góðan drekkamunn, men áðrenn fólk komu so langt var ymiskt til undirhalds á skránni. Her vístu nakrir av næmingunum av sonnum, at teir eisini hava tónlistarligar gávur.

Saman við lærara teirra, Anniku Højgaard høvdu tey vant nøkur løg, og sum vórðu framførd til stóra fragd fyri foreldrum, systkjum, lærarum og onnur.

Til hesa løtuna høvdu aðrir næmingar sett fram nøkur av handaligu verkum sínum, og her kundu so foreldrini síggja, hvat tey hava fingið burtur úr á hesum økinum.

Skúlin á Trøðni er sjálvstøðugur, almennur serskúli. Hann skal veita undirvísing til næmingar, sum ikki kunnu fáa nøktandi undirvísing í nærumhvørvinum.

Serskúlin undirvísir næmingum í fólkaskúlaldri, tó kunnu næmingar halda fram við skúlagongdini til endan á tí skúlaári, tá teir fylla 18 ár.



*Tað er helst ikki so ofta, at ein sær fólk spæla á blokkfloytu – við einari hond*



*Hesar báðar hava fingið væl burtur úr handaligu lærugreinunum. Glaskrukkuna, fremst á myndini hevur Estrid sjálv gjørt*